# Fuglafjørður og fuglfirðingar á verdugum søguligum palli




STEFFEN STUMMANN HANSEN HEVUR SAMAN VIÐ FUGLFIRÐINGUM LAGT FYRSTA PART AV STÓRVERKI ÚR HONDUM UM FUGLAFJØRÐ OG FUGLFIRÐINGAR FRÁ LANDNÁMI OG FRAM TIL SEINNA HEIMSBARDAGA

**Jóannes Hansen**



Steffan Stumman Hansen, søgufrøðingur og fornfrøðingur, hevur skrivað bókina

LEINGI ER TAÐ, IÐ VÆL skal vera. Soleiðis plagar at verða tikið til, og týskvøldið var tað sjón fyri søgn. Tá var fyrsta bind av søguni um Fuglafjørð og fuglfirðingar lagt fram á samkomu í Ribarhúsi. Tað hevur tikið sína tíð, áðrenn fyrsti partur av søguni sá dagsins ljós. Arbeitt hevur verið við søguni tað mesta av hesi øldini, og týskvøldið vóru tíðindini, at annað bind er komið undir land, og at tað verður roknað við, at tað verður liðugt fram ímóti sumri í 2024, og vit kunnu beinanvegin staðfesta, at tað, sum týskvøldið varð lagt fram, er íligið og eitt valaverk.

Tað er søgufrøðingurin og fornfrøðingurin Steffen Stummann Hansen, sum hevur skrivað. Aftrat sær hevur hann havt ritstjórn, og nú tað var komið undir land við kanning og gransking, hevur tað serliga verið fuglfirðingurin Petur Martin Petersen, sum hevur verið lokali maðurin í arbeiðnum við eitt nú so at siga at skanna bygdina fyri at finna myndir og skriva søguna um einstøku myndirnar.

Tá ið fyrsta bind varð lagt fram, bar Eyðun á Lakjuni formaður í mentanarnevndini hjá Fuglafjarðar býráð fram røðu, og í tí sambandi bað hann samkomuna reistast og minnast tveir av limunum í søgunevndini, sum eru farnir í annað ljós, nú síðsta hond varð løgd á verkið.

Tey eru Jóna Lindenskov í Havn, sum var ættað úr Fuglafirði, og Frits Johannesen. Frits – øll í Fuglafirði, føroyingar yvirhøvur og so mong onnur kendu Frits – var borin til gravar nú mánadagin, og hann hevur saman við Evaldi Johannesen, Jann Toftegaard og Peturi Martin Petersen skrivað undir fororðini, har tað um leiklutin hjá Jónu Lindenskov verður sagt soleiðis:

Jóna Lindenskov, sum í ein mansaldur hevur arbeitt við ættarsøgu, við serligum denti á heimbygdina, hevur verið ein týdningarmikil hjálp – serliga viðvíkjandi ættarsøguliga partinum. Tíverri náddi Jóna ikki at uppliva, at hetta arbeið hennara bleiv veruleiki.

Fyrst í bókini eru heilsanir til minnis um Jónu Lindenskov og Freydis Poulsen.

Petur Martin Petersen var samskipari í søgunevndini, sum í 2006 heitti á Freydis Poulsen í Klaksvík um at vera samskipara, sum meira burturav fekst við at laga til tað tilfar, ið varð savnað. Seinni varð gjørt av at víðka sjálva bygdarsøguna í 1000 ár við eini húsasøgu, har øll hús eru tikin við, ið vóru at finna á eini loftmynd av bygdini, sum var tikin úr flogfari í 1958.

Fyri nevndina og so mong onnur var tað stórur skelkur, tá ið Freydis Poulsen brádliga andaðist í 2011. Tá heitti nevndin á Steffen Stummann Hansen um at taka um endan, har Freydis slepti. Fuglafjarðar kommuna setti hann í starv sum søgusamskipara at fullføra hetta stórverk, og Steffen varð samstundis partur av søgunevndini.

## Høvundurin greiðir frá arbeiðnum

Steffen Stummann Hansen greiddi týskvøldið áhugaða skaranum – eini 75 fólk – frá um arbeiðsgongdina, og lýsti so áhugavert fyritreytirnar, tá ið 1000 ára søga um Føroyar og Fuglafjørð skuldi skrivast. Fyri stóran part av langa tíðarskeiðnum er lítið skrivað. Tí var høvuðskeldan útgrevstur, sum er gjørdur. Eisini í Fuglafirði har Sverri Dahl í 1958 stóð fyri kanningum heimi á Oyrini.

Steffen takkaði lokalu nevndini fyri gott samstarv. Hann lýsti arbeiðsgongdina við hesum fyrsta bindinum soleiðis, at parturin hjá honum var sum søgufrøðingur at skipa arbeiðið fakliga við støði í samandrátti av arbeiðum, sum hann fyrr hevur gjørt og fyri ein part – sum ikki er av lítlum týdningi – á nýggja grundgransking, bygd á m. a. upprunaskjøl í skjalasøvnum. Mong av hesum eru endurgivin í brotum ella í síni heild, soleiðis at lesarin sjálvur kann koma at kenna tey. Afturat hesum hava mong privatfólk verið sera beinasom at siga frá síni vitan og eru eisini komin við skrivligum tilfari. Í umfatandi arbeiði við notum, kann lesarin kunna seg um, hvørjar keldur eru nýttar, og hvar hesar eru at finna. Ein ritstjórnarlig leiðbeining er at finna aftast í bindinum.

Steffen Stummann Hansen takkaði Fuglafjarðar bókasavni, sum við stórum eldhuga og góðum úrsliti hevur megnað at nøkta tørvin at læna bókmentir heim – enntá í mongum førum, tá ið tær skuldu skaffast uttanfyri Føroyar. Hann bar serliga tøkk til Marjun Patursson, sum hevur hjálpt nógv við at seta upp bókaskránna.

Og so tók Steffen Stummann Hansen soleiðis samanum:

Sum "komandi uttanífrá" havi eg sjálvandi verið bundin av stórari og virknari hjálp frá limunum í søgunevndini í sambandi við at savna inn tilfar, leiðbeining og atfinningarsamar viðmerkingar. Eg havi teimum øllum nógv fyri at takka fyri ta hjálp og tann stuðul, sum tey hava veitt gjøgnum tilgongdina. Uttan teirra part var hetta verk ikki vorðið til. Somuleiðis eina stóra tøkk til John Dalsgarð fyri vandaliga gjøgnumgongd av handriti og viðmerkingar í hesum sambandi.

## Innihaldið

Steffen Stummann Hansen hevur skrivað handritið á donskum. Tað er Kristin Poulsen fyrrverandi lærari í Fuglafirði, sum hevur umsett tekstin til føroyskt. Hetta eigur at hava verið stór uppgáva, tí Steffen er vísindamaður og at flyta danskan vísindaligan tekst yvir í livandi føroyskt mál, man hava verið stórt tak. Málið flýtur væl, og tað er eydnast væl at finna orð og vendingar fyri fakhugtøk.

Heitið á bókini er Fuglafjørður og fuglfirðingar I Landbúnaðarbygd. Eftir inngang við m. a. hugleiðingum um keldur verður gjørt burtur úr, tá ið fornfrøðiliga og mentanarsøguliga áhugaði danski hermaðurin Daniel Bruun (1856 – 1931) á fyrsta sinni vitjaði í Føroyum. Tað var í 1896, og hann teknaði hópin av motivum í Føroyum og eisini í Fuglafirði – eitt nú landsløg, fólk og hús – og so skrivaði hann um tað, sum hann sá og upplivdi.

So verður skrivað um fyrndarsøguna og um miðøldina, og alt verður sett í søguligt europeiskt høpi.

Nakrar hendingar í sambandi við siðaskiftið vera umrøddar, og so eru tað sagnir og staðarnøvn og nøkur brot úr landbúnaðarsamfelagnum. Vanlukkutilburðir á sjónum og fjørðinum vera umrødd, og so verður nógv gjørt burtur úr nógva samskiftinum og sambandinum, sum Fuglafjørður hevur havt við útheimin. Eitt nú sambandið við Grimsby og serliga áhugavert er at lesa um dreymin um Amerika og søgurnar um lagnurnar hjá teimum, sum fluttu yvir hagar. Sum ískoyti er yvirlit yvir hús í Fuglafirði fram til 1950.

Um eitt hálvt ár ella so verður bind tvey lagt fram, og skjót gjøgnumgongd av fyrsta bindi ber boð um, at tað bíðar meiri áhugavert um Fuglafjørð og fuglfirðingar. Steffen Stummann Hansen, Petur Martin Petersen og hini í søgunevndini og býráðið í Fuglafirði eru farin undir at laða ein virðiligan, litríkan og professionellan varða yvir tað og tey, sum eru farin. Tað klæðir kommununi við nógvari og fjølbroyttari vinnu og mentan so sera væl.



Petur Martin Petersen, sum hevur verið við í arbeiðsbólkinum øll árini, Steffen Stumman Hansen, sum hevur skrivað bókina og Eyðun á Lakjuni, formaður í mentanarnevndini hjá Fuglafjarðar kommunu



Freydis Poulsen, sum andaðist í 2011, skuldi upprunaliga skrivað bókina



Jóna Lindenskov, sum hevur verið við í arbeiðsbólkinum, andaðist í summar



Nógv fólk vóru komin til hátíðarhaldið í Ribarhúsi í Fuglafirði, tá bókin um Fuglafjørð varð løgd fram